hátíðarhildið, at legur høvdu verið her í samfull 40 ár.

Legurnar byrjaðu upprunaliga tvey ár frammanundan – í 1965 – við Áir, og var hetta sama árið sum økið í Vatnsoyrum varð keypt við tí í hyggju at byggja eitt leguhús á staðnum. Í 1967 varð fyrsta legan hildin her á Zarepta.

Hóast tíðirnar broytast og menniskjuni við, so er endamálið við barna- og ungdómslegunum kortini hitt sama: »At vinna børn og ung fyri Kristus og at læra tey Orð Guds«, sum tikið verður til.

Samstundis við hetta verður eisini dentur lagdur á at leggja eitt støði undir ymiskar dagligar lívsmeginreglur í lýdni, atferð og í virðing fyri náttúruni, mentanini og tjóðskaparvirðunum.

Men kristna boðanin í talu og sangi um barna- og ungdómsvinin besta, Jesus er kortini hon, ið er grundarlagið undir øllum virkseminum her í Zarepta.

- Eg havi ofta verið á legum her. Og her er bara gott at vera, sigur Gunhild Jacobsen.

### Okkurt til øll

Í teirri dagligu skránni fyri hvørja einstaka legu er alt gjørt fyri, at øll skulu fáa okkurt burturúr.

Umframt tann andaliga partin er eisini møguleiki til ítrótt, sigling, ítriv av ymiskum slagi, eins og møguleiki sjálvandi skal vera fyri at tey ungu kunnu hugna sær saman í fríløtunum.

Sjálv er Gunhild sera fegin um øll tiltøkini á leguni – bæði sangin, boðskapin og bíbliutímarnar.

Tað er so skjótt at ein ungur kann gloyma ymiskt í Bíbliuni. Men á eini slíkari legu kann alt verða frískað upp aftur, ella ein fær okkurt heilt nýtt at vita, - okkurt, sum ein ikki visti áður.

Hetta gav at bíta eina dagin, tá evnið var Dánjal. Har fekk hon eisini nógv áhugavert at vita um henda profetin, sum so nógv er skrivað um í Gamla Testamenti.

- Eg haldi bara at alt her á leguni er sera gott, sigur hon.



## Ein hósdagur á ungdómsleguni:

| | |
|---|---|
| **Kl. 07:30** | **Andakt, leiðarar og starvsfólk** |
| **Kl. 08:00** | **Veking av leguluttakarum við sangi** |
| **Kl. 08:20** | **Morgunfimleikur í túninum** |
| **Kl. 08:25** | **Merkið í húnar hátt og ørindi úr tjóðsanginum sungin** |
| **Kl. 08:30** | **Morgunmatur** |
| **Kl. 09:00** | **Andakt á kamarinum** |
| **Kl. 09:00** | **Rudding av kamarinum** |
| **Kl. 10:00** | **Bíbliutími** |
| **Kl. 12:00** | **Døgurði** |
| **Kl. 13:00–18:00** | **Gongutúrur á Fjallavatn, ella fótbóltur, kano, bátar, ítriv, svimjing, kiosk o.a.** |
| **Kl. 18:00** | **Náttúrði** |
| **Kl. 19:00** | **Kvøldseta, sangur, spurningar, spæl v.m. í salinum** |
| **Kl. 20:00** | **Fríløta** |
| **Kl. 21:00** | **Drekka** |
| **Kl. 21:30** | **Søgan** |
| **Kl. 22:45** | **Andakt á kamarinum** |
| **Kl. 23:30** | **Friður** |



*Eftir langa og trúgva tænastu sum deknur við Miðvágs kirkju, fekk Leivur Nattestad riddarakross frá Margrethu drotning í fjør. Her handar fyrrverandi biskupur okkara, Hans Jacob Joensen honum heiðurin*

*Mynd: Trúboðin*

# Leivur hevur altíð arbeitt

**Hóast hann nærkast teimum 80, er Leivur Nattestad í Miðvági framvegis til arbeiðis hvønn einasta dag. Hann hevur verið deknur í Miðvágs kirkju í 40 ár og sitið í stýrinum fyri missiónshúsið í 35 ár. – Eg havi nógv at takka fyri. Eg havi havt eina góða heilsu og havi altíð kunnað arbeitt, og tað, at arbeiða, er balsam fyri sálina, sigur hann**

BYGDARMYND
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Miðvágur**: - Eg fór til skips sum 18 ára gamal við miðvágstrolaranum, Varðbergi, sigur 79 ára gamli Leivur Nattestad við málgagnið hjá Heimamissiónini, Trúboðin.

Fyri henda fyrsta túr sín fekk hann 2100 krónur í avrokning.

– Tað ljóðar kanska ikki av so nógvum, men tá fekk man nakað fyri pengarnar. Tað var ein heilt onnur tíð, men vit vóru glað fyri tað lítla, vit høvdu, leggur hann afturat.

Leivur arbeiddi eisini sum lærlingur í smiðjuni hjá Jákupi Joensen, ella Jákup Smið, nú betur kent undir navninum J. K. Joensen & sonur.

Í 1951-52 gekk Leivur á maskinskúla í Havn, og fór í 1964 undir sjálvstøðugt virki á landi. Tað var innan VVS-arbeiði. Í 1986 fór hann undir handilsvirksemi Sp/f Leivur Nattestad.

– Vit hava havt nógvar stórar uppgávur gjøgnum árini, til dømis kann eg nevna ítróttarhøllina á Giljanesi, Flakavirkið og Ellisheimið, sigur hann.

Fyri nøkrum árum síðani, tók sonurin, Atli Dávur, yvir hetta virksemi, men Leivur arbeiðir framvegis saman við honum. Í farnu viku kom fram, at fyritøkan hevur lagt saman við Demich.

### Andaliga virkin

Á tí andaliga økinum hevur Leivur verið virkin í mong ár.

– Eg havi gingið í kirkju og missiónshús, síðan eg var smádrongur, ja, alt tað, eg kann minnast, sigur Leivur í longri samrøðu við Trúboðan.

Leivur minnist serliga væl veturin 1945-46.

– Tá var missiónsvika í Miðvági og stór veking. Eg minnist serliga ein mann, sum talaði, tað var Palli Mortensen, vanliga nevndur Argja-Palli. Tað komu sera nógv fólk til møtini tá, og tað var ein góð tíð andaliga.

– Hóast eg altíð havi átt trúnna, so gjørdist orðið serliga livandi fyri mær tá, og eg eri glaður fyri at kunna siga, at eg eigi eina persónliga trúgv á Jesus sum mín frelsara, sigur Leivur.

Leivur sat í stýrinum fyri Miðvágs missiónshús í 35 ár, harav tey 17 árini sum formaður.

Konan, Marjun, hevur eisini verið virkin innan missiónsarbeiðið. Umframt at standa fyri kvinnumøtunum í mong ár, hevur hon eisini verið við til at halda sunnudagsskúla í útivið 50 ár.

### Deknur í 40 ár

Innan kirkjuna hevur Leivur eisini verið trúgvur í tænastuni. Hann var deknur frá 1967 til 2007.

– Tað var táverandi sóknarpresturin, Høgni Poulsen, sum spurdi, um eg kundi hjálpa til sum deknur viðhvørt, sigur Leivur, og so varð eg hangandi. Mær dámdi tað væl, og man kemur væl inn í Skriftina, men tað var nokkso bundið, tí eg var einsamallur deknur í fleiri ár. Seinnu árini hava tað verið onnur, sum eisini hava lisið. Tað var nógv betur.

Leivur legði frá sær sum deknur í fjør, og fekk tá medalju frá Margretu drotning fyri trúgva tænastu. Leivur var seinni, sum siður er, niðri hjá drotningini og takkaði henni fyri medaljuna.

– Hon var sera fyrikomandi, og vit fingu eitt gott prát saman, sigur Leivur.